# Semja millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Sáttmálaskeið og lønarkarmur:**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2019 til 30. september í 2021.

Tann 1. oktober 2019 hækkar mánaðarlønin:

| | |
|---|---|
| Lønarstigini 1 til 21: | 795,00 kr. |
| Lønarstigini 22 til 50: | 595,00 kr. |

Tann 1. oktober 2020 hækkar mánaðarlønin:

| | |
|---|---|
| Lønarstigini 1 til 50: | 2,25 %. |

## Broytingar í Sáttmálanum:

**§ 43 Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli kemur í gildi tann 1. oktober 2019. Báðir partar kunnu siga sáttmálan upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober 2021. Í sambandi við at siga sáttmálan upp, kann annar parturin krevja, at samráðingarnar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingarnar byrja um at endurnýggja sáttmálan 6 mánaðir áðrenn hann fer úr gildi.

## Broytingar í flokkingaravtalu:

**Miðallangar útbúgvingar**

Galdandi frá 1. Oktober 2019: Bachelorar ganga stigini: 17, 18, 19, 20, 21, 23, 25, 27

Flokkingin er ætlað útbúgvingar á støði við professiónsbachelor, ið hoyra til sáttmálaøkið hjá Starvsmannafelagnum. Hetta eru t.d tannarøktarar, sosialráðgevarar, bókavørðar o.o., sum í dag eru flokkað sum professiónsbachelorar.

Skulu aðrar útbúgvingar á hesum útbúgvingarstøði verða umfataðar av hesi flokking, skal tað avtalast sáttmálapartarnar ímillum.

Treyt fyri at verða umfataður av hesi flokking er somuleiðis, at starvsinnihaldið krevur nevndu útbúgvingar.

*Yvirflyting*

Starvsfólk, sum 1. oktober 2019 eru á stigunum 17-21 varðveita verandi dato fyri starvsaldurs-broyting, og verða verandi á sama stigi fram til komandi dato fyri starvsaldursbroyting. Starvsfólk á stig 22 flyta á stig 23 tann 1. oktober 2019 og framtíðar dato fyri broyting av starvsaldri verður 1.

SS

9a

oktober. Starvsfólk á stig 23 flyta á stig 25 1. oktober 2019 og framtíðar dato fyri broyting av starvsaldri verður somuleiðis 1. oktober.

Stig 27 verður tikið í nýtslu 1. oktober 2020.

**Flokking av deildarleiðarum:**

Deildarleiðarar eru í trimum flokkum:

| | |
|---|---|
| Deildarleiðari 1, gongur | lønarstigini 21-26 |
| Deildarleiðari 2, gongur | lønarstigini 27-33 |
| Deildarleiðari 3, gongur | lønarstigini 34-40 |

Protokollat viðv. Lønartalvuni:

Partarnir eru samdir um, í sáttmálaskeiðinum, at kanna møguleikan fyri endurskoðan av bygnaðinum av lønartalvuni, og avleiðingarnar av hesum.

Tórshavn, hin 03.06.2020

**Starvsmannafelagið**

Súni Selfoss, form.

Noomi K. Rasmussen, næstforkv.

Hilmar Augustinussen, nevndarl.

Birita Kjærbæk, nevndarl.

Borgný Mohr, nevndarl.

Anna Johannesen, felagsskr.

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Annika Olsen, forkv.

Bogi Bendtsen, nevndarl.

Eyðdis H. Niclasen, nevndarl.

Jógvan í Skorini, nevndarl.

Pauli T. Petersen, nevndarl.

Poul Andrias Joensen, nevndarl.

Anita Fuglø, leiðari

9c